




# Rasmus Rasmussen, gittarleikari í Makrel og í seinastuni eisini í Deja Vu og útvarpsvertur í Rokkstovuni, 25 ár

**Lýs teg sjálvan við trimum orðum:**
Treiskur, smæðin, droymandi.

**Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?**
Hattar er feitt hattar har, mega sakin, ordiliga kul.

**Hvørjum hyggur tú at hjá tínum kyni?**
Øllum.

**Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?**
Eg eri so gott sum aldrin uppi um morgunin. Men um eg fari í býin, ella á konsert, dámar mær væl at osa stereo anleggi í baðirúminum frá, og tá kann alt tilsamans saktans varða langt yvir ein tíma.

**Hvat stressar teg?**
Rokningar. At bíða eftir at sleppa út úr flúgvaranum. At keypa í støðum har sum tann ið avgreiðir, ger so skjótt av, at viðskiftafólkið aftanfyri meg noyðist at bíða eftir, at eg flytið meg, tí eg ikki havi nátt at koyra vørurnar í posan. Óskipaður larmur. At noyðast at gera meir enn eitt ting í senn, og mangt, mangt annað. Eg verði alt ov lætt strongdur.

**Hvat gleðir teg?**
Eitt smíl. Eitt gott ball. Góð vinfólk. Ein góð konsert. At eg merki, at onkur vil mær væl. At hoyra fólk rósa hvørjum øðrum. At fáa rós. At fáa eitt klemm ella ein muss. At eg eri til. At onnur eisini eru til. At hoyra onnur flenna. At drekka kaffi og roykja eina sigarett, júst tá eg havi etið morgunmat. At onkur sigur ella ger okkurt óvæntað. Góður tónleikur, serstakliga jólatónleikur, ósmæðin føroyskur punktónleikur, og kultrokkur frá Vágoynni, fær meg í gott lag.

**Nær feldi tú seinast eitt tár?**
Á undan-útgávu konsertini hjá Peturi Pólson í Losjuni í Gøtu, tá Bogi Á Lakjuni hálvgrátandi spældi solo'ðinia í síðsta lagnum á konsertini. Tað var so mikið rørandi, at har fullu eini 2-3 tár, og eg hugsaði við mær sjálvum, at hasin maðurin dugir at spæla gittar.

**Nær smakkaði tú tær seinast á?**
Í gjár. Deiligt at Atlantic Airways bjóða ókeypis øl, og brennivín í flúgvaranum.

**Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?**
Eg havi leingið ynskt mær ein LP-plátuspælara, og nú havi eg so endiliga fingið ein. Tað er nýggja dyllan hjá mær, og sangaranum í Makrel, Ára Rouch. LP-plátur við bestu ljóðgóðsku, og stórum hylstrum, tað er for kul!

**Hvar arbeiðir tú?**
Í Rokkstovuni, og í venjingarhølinum.

**Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at spæla gittar?**
Ver treisk/ur og halt áfram, sjálvt um tú til tíðir vilt gevast. Hvørja ferð tú yvirlivir mótgang í gittarspælinum, gerst tú ein betur gittarleikari, við meiri sjálvsálitið. Ikki lurta ov nógv eftir hvat onnur siga, at man skal gera fyri at gerast dugnalig/ur, men ger tínar egnu royndir. T.d. tí at tað kann væl vera, at tað, sum loysir seg best fyri teg, er at venja 15 minuttir annan hvønn dag, ístaðin fyri tvinga teg til at venja 10 tímar hvønn dag, sum í versta falli kann enda við, at tú gevst. Halt teg burturfrá fyrrverandi bitrum tónleikarum, ið kritisera alt sum tú gert, tí at teir aldrin blivu til nakað sjálvir. Tak tað, sum tú spælir upp og lurta eftir tí. Finn nakrar tónleikarar, sum duga betur enn tú, at spæla saman við. Og mest týdningarmikið, brúka tað, sum tú hevur innaní tær sjálvari/sjálvum, at spæla við. Líkamikið um tað er ljótt, vakurt, ógvusligt, bleytt, stuttligt ella trist.

**Hvat er besta uppfinningin og hví?**
Tónleikur. Tí at góður tónleikur kann siga tað, sum tú aldrin hevði kunna sagt við orðum og leiða teg fram til støð, ið tú als ikki visti vóru til. Eitt sindur, sum ein góður filmur, men bara betur, tí at tú sleppur sjálv/ur at ímynda tær myndirnar afturvið.

**Hvat hevur tú í lummunum beint nú?**
Mína fartelefon, ein ring, 6 plektarar, ferðaspjald, 3 buss kvittanir og ein tóman Twix pakka.

**Hvat er títt besta heimaráð?**
Ehmmm, krydda eggini, sum tú steikir á pannuni, tí at tað smakkar bara nógv betur. Serliga Paprika og Aromat rigga væl saman við eggum, eri eg komin fram til. Tað ber eisini til at leggja hamburgarygg ella salami viðskera undir eggini og somuleiðis ost omanyvir.

**Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?**
Hømm, hømm, hømm, heim at gera hømm, hømm, hjømm, heim at gera høøøøøøøøøømmmmmmmmm. Hann er heilt einastandandi. Tá eg var til Pipar og Salt sýningarnar í Norðurlandahúsinum herfyri, og hann spældi Torstein úr Sumba, táraði eg og fekk ikki anda, sum eg flenti.

**Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?**
Tann, sum hevur funnið uppá hendan spurningin. Tí at eg haldi, at hetta er ein keðiligur spurningur, sum onki gott hevur við sær.

**Hvussu ofta speglar tú tær?**
Nakrar ferð um dagin. Áðrenn eg fari út og sovorðið, veit ikki - 5 ferð.

**Hvussu ofta ert tú hjá frisør?**
Tað er ymiskt. Onkuntíð hvønn mánað, og aðrar tíðir gongur eitt hálvt ár ímillum.

**Hvør er tín stuttligasta tónleikauppliving?**
Ja, har eru fleiri. Eg minnist akkurát nú tað einu ferðina, eg spældi í Suðuroynni í høllini í Trongisvági í sambandi við Prix Føroyar 1997. Tá var ein bólkur har, ið minnist meg rætt, kallaðist "Stain". Teir spældu tungan thrashmetal tónleik. Undir framførsluni blakaði sangarin sínar tekstir út til áhoyrararnar, so at onkur heppin kundi sleppa at eiga teir, men øll fluttu seg undan og lótu teir falla á gólvið! Og so hevði hesin sami sangarin eisini lova onkrum, áðrenn konsertin byrjaði, at hann skuldi geyla "Sjókúgv" í mikrofonina, hvat enn so tað merkir. Og hann so gjørdi, meira enn einaferð. Tað heila var, sum tikið úr, "Spinal Tap" filminum.